# Hava ikki brúk fyri Owen

Framherji Michael Owen hevur hálvt ár eftir av sáttmála sínum við Newcastle, og dúliga verður gitt, hvørt Owen fer at skifta felag longu í januar, tá flytingarvindeygað letur uppaftur. Eitt av feløgunum, sum hevur verið sett í samband við Owen, er Chelsea, men ikki øll halda, at brúk er fyri Owen. - Owen er ein sera góður spælari, men við Anelka og Drogba rokni eg við, at vit hava nóg mikið av álopsspælarum, sigur Frank Lampard.



# Beckham í Milan

Nú er David Beckham til reiðar at spæla fyri italska felagið AC Milan, og har eru tey so fegin um leiguavtaluna, at tey vóna, at Beckham fær hug at halda fram í felagnum. Beckham er sáttmálabundin við LA Galaxy, men nú fótbólturin í USA liggur stillur í eina tíð, hevur AC Milan leigað Beckham í tríggjar mánaðir. AC Milan vónar, at leiguavtalan kann endurtakast næsta ár.

# Heimsins besta fótbóltsfelag

**Wayne Rooney skeyt einasta málið, tá Manchester United í gjár vann HM-finaluna fyri feløg**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Seinastu vikuna hevur verið dystast um HM-heitið fyri fótbóltsfeløg, og í dag var so finala millum enska Manchester United og Liga de Quito úr Ecuador.

Og tað gjørdist enska stórfelagið, sum vann dystin. Sæð burtur frá eini hóttandi deyðbóltsstøðu, hevði Manchester United fult tahmarhald á dystinum, men tað gekk tó sera striltið við at umseta hetta til mál.

Ikki minst hevði Wayne Rooney nakrar góðar møguleikar fyri steðgin, men hann og liðfelagarnir máttu bíða til miðjan seinna hálvleik, áðrenn hol kom á. Tá beindi Rooney eitt innlegg frá Cristiano Ronaldo í meskarnar, og hetta gjørdist eisini einasta málið í dystinum.

Móti dystarenda varð Nemanja Vidic hjá Manchester United rikin av vøllinum, og Liga de Quito royndi at trýsta. Talan gjørdist eisini um onkra einasta naska roynd, men tað eydnaðist Vand er Saar at halda búðurið reint, og so kundi enska stófelagið staðfesta, at teir í ár eru best í Onglandi, í Europa og í øllum heiminum.

Wayne Rooney varð sjálvur kosin sum besti spælarin í dystinum, og fyri hetta fekk hann ein Toyota Prius frá Toyota verksmiðjuni, sum í fleiri ár hevur verið høvuðssponsor handan HM-kappingina fyri feløg.

Gamba Osaka vann fyrr í dag dystin um triðja plássið í kappingini.



*Wayne Rooney og Cristiano Ronaldo fegnast um málið, sum Rooney júst hevur skotið. Talan varð um einasta málið í dystinum, og so kann Manchester United eisini rópa seg fyri heimsins besta fótbóltsfelag*

*Mynd: Polfoto/AP*

# ÍF í finaluni



*Fleyr vann hetta vikuskiftið á Mjølni, og enn eru havnarmenninir beint í hølunum á ÍF og SÍ*

**Við sigri á SÍ hava fuglfirðingar vissað sær sæti í steypafinaluni í flogbólti**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan tykist verða um sera spennandi kapprenning í føroyskum mansflogbólti í ár.

SÍ, sum annars hevði hug at renna undan fyrstu umførini, hevur nú tapt tvær reisur upp á tvey umfør. Hesa ferð móti ÍF, sum við sigrinum vissaði sær sæti í steypafinaluni, sum verður í februar mánaði.

Í hinum dystinum vann Fleyr á Mjølni, og har við er Fleyr framvegis í hølunum á teimum báðum fremstu liðunum. Liðið hjá Fleyr er styrkt, síðani í fjør, og avrikini higar til hava víst, at teir avgjørt ætla sær at kappast heilt frammi í oddinum.

## Hondbóltur

### Sunset-kappingin

| | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 10 | 8 | 1 | 1 | 277 | 203 | 74 | 17 |
| 2 VB | 10 | 8 | 0 | 2 | 278 | 219 | 59 | 16 |
| 3 Tjaldur | 10 | 5 | 2 | 3 | 263 | 238 | 25 | 12 |
| 4 Neistin | 10 | 4 | 3 | 3 | 252 | 242 | 10 | 11 |
| 5 StÍF | 10 | 2 | 0 | 8 | 229 | 294 | -65 | 4 |
| 6 Kyndil | 10 | 0 | 0 | 10 | 173 | 276 | -103 | 0 |

### Atlantic Airways-kappingin

| | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Neistin | 9 | 7 | 0 | 2 | 276 | 253 | 23 | 14 |
| 2 VÍF | 9 | 7 | 0 | 2 | 241 | 225 | 16 | 14 |
| 3 H71 | 9 | 6 | 0 | 3 | 243 | 212 | 31 | 12 |
| 4 StÍF | 9 | 3 | 2 | 4 | 215 | 222 | -7 | 8 |
| 5 Kyndil | 9 | 1 | 2 | 6 | 221 | 251 | -30 | 4 |
| 6 KÍF | 9 | 1 | 0 | 8 | 216 | 249 | -33 | 2 |

## Flogbóltur

### Eik-ligan, kvinnur

| | dystir | v | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 12 | 11 | 1 | 35 | 16 | 19 | 22 |
| 2 Mjølnir | 11 | 7 | 4 | 25 | 17 | 8 | 14 |
| 3 Fleyr | 11 | 7 | 4 | 24 | 16 | 8 | 14 |
| 4 Dráttur | 11 | 6 | 5 | 24 | 21 | 3 | 12 |
| 5 ÍF | 11 | 6 | 5 | 22 | 18 | 4 | 12 |
| 6 KÍF | 11 | 2 | 9 | 16 | 27 | -11 | 4 |
| 7 TB | 11 | 0 | 11 | 2 | 33 | -31 | 0 |

### Eik-ligan, menn

| | dystir | v | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 6 | 5 | 1 | 17 | 5 | 12 | 10 |
| 2 SÍ | 6 | 4 | 2 | 13 | 10 | 3 | 8 |
| 3 Fleyr | 6 | 3 | 3 | 10 | 11 | -1 | 6 |
| 4 Mjølnir | 6 | 0 | 6 | 4 | 18 | -14 | 0 |